# LANDSROYND 6. FLOKKUR

APRÍL 2012

## Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir ímillum skákstrikurnar lisnir tvær ferðir. Av teknum verða punktum lisin. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Næmingarnir kunnu hava orðalistar og orðabøkur við sær til royndina, sum teir nýta í vanligu undirvísingini í føroyskum.

/Her **situr** Alva./ **Framman fyri henni/ liggur** roknibókin opin./ Men Alva **tímir ikki/ at rokna**./ Hon **heldur einum** hárlokki/ **millum** fingrarnar/ og **hyggur niður yvir** skúlagarðin./ **Fyrst kemur** ein **ketta**,/ **ið kanska** er vilst./ So sær hon tvey úr framhaldsdeildini **standa /** og kyssast **yviri við** súkklulagið./ Tey mundu halda ongan **síggja seg**./ Tannáringarnir **mussast leingi**,/ og Alva **hyggur**,/ til Ursula **snarar** sær á/ at **síggja**,/ **hvørjum** Alva **hyggur** at./ **Tá ið** Ursula fær eyga á/ tey **bæði**, sum mussast,/ **skumpar** hon **undir** Alvu og gnisar./ Ikki hart, **men** nóg **mikið/** til at Lena **hyggur** hvassliga/ at **teimum**./ Alva **suffar/** og **fer aftur** at rokna./

Og **har situr** Viktor,/ **aftast** í **flokkinum**./ Viktor er ein av **teimum stillu** dreingjunum,/ sum **sleppur** at sita har **afturi**./ Hann tyggur **blýantin/** og kveitir at **klokkuni/** yvir **hurð-ini**./ Eitt **korter** til **trý**./ Um eitt korter **sleppa** tey./ Tá ið ringt er út, **skal hann ringja/** á **arbeiðsplássið** til mammu/ og **spyrja**,/ um hann skal **ganga** til hús./ Kanin **hansara/ -** hon **eitur Hoppa** –/ var eitt sindur løgin í **morgun**./ Tóktist **móð** og át **onki/einki**./ Bara hon ikki er **sjúk**./ Viktor bendir stólin afturav móti **vegginum**, rembir sær og geispar./ **Fjúrtan minuttir./ Trettan./ Tólv./**

**Spurdi** tú Alvu,/ **hvat henni dámdi** Viktor,/ **svaraði** hon,/ at hann er **fittur**./ Hann **kemur** ikki í **bólk** við teim dreingjunum,/ sum rópa og beistast og troka seg **fram/** í bíðiraðnum í **matstovuni./** Tá ið tey **gingu/** í **fyrsta flokki,/ spældu** Viktor og Dan **ofta/** við **hana** og Ursulu/ **eftir skúlatíð**./ Tey **gjørdu koyggjur** í kamarinum, sum tey høvdu til órudd./ Nú ið tey **ganga** í **triðja**,/ spæla **dreingir** og **gentur/ næstan** ikki/ við **hvørt annað**./ Nøkur í **flokkinum** hava spurt um forlovilsi/ og eru nú **saman**./ Alva **undrast** á,/ **hvat** ið tey **gera**,/ tá ið tey eru **saman/ uttan** at mussast,/ tá ið **ongin/eingin** sær./

Spurdi tú Viktor, hvat ið **honum** dámdi Alvu,/ **mátti** hann hugsa seg um eina løtu./ Hann **hevur** líka sum/ ikki **hugsað** um **hana,/ síðani** tey sum smá/ **spældu** saman./ Viktor **hugsar** ikki **nógv/** um **genturnar** í **flokkinum./** Tær eru **har** og tosa og gnisa og hava loyndarmál,/ **men** tey viðvíkja ikki honum./ Viktor **hevði hugsað** eina løtu,/ og so hevði hann sagt, at Alva er **bara** fitt./ Fitt av **gentu** at vera./ Ikki ein, sum **gongur** og skapar sær./ **Rættiliga** fitt **eisini,/ hevði** Viktor sagt./ So mundi hann farið at tosað um **okkurt annað**./ **Kaninir** til dømis./

**Hetta** er ein vanligur,/ **gráur dagur** í **februar**./ Hvørki **teirra** veit,/ at tey **skjótt fara** at verða skotin/ í hvørt **øðrum**./

Tað er Annika Thor, sum **hevur skrivað** bókina,/ Reytt hjarta bláur firvaldur./ Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur **givið hana** út í 2002./

Karl N. Hansen **týddi bókina/** úr **svenskum**./